**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Glyvra Blákrossfelag**
Leygarkvøldið 3. februar kl. 19 verður blákrossfest í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum. Luttøka við Asbjørn Jacobsen, kunningarleiðara og Martin Kúrberg, rúsevnisráðgeva á Blákrossheiminum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00. Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegi 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur er hvørt týskvøld kl. 21.00 í Havnaskrivstovuni í Runavík.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**HUFF, Hundaeigarafelag Føroya**
*limur í Dansk Kennelklub, kreds 12.*
Telefonin hjá felagnum er: 277317. Til ber at tekna seg sum lim og spyrja um eitthvørt viðv. hundum. Hvørt týskvøld kl. 19.00 ganga vit túr, møtast við Skógrøkt Landsins.

**Giktafelag Føroya**
**MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13.00 til 16.00.

**Cøliakifelag Føroya**
Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783.


inni - trygt og ómaksleyst til hús

**Eigaraíbúð – Velbastaðvegur 115, Tórshavn**
Íbúðin er í einari hædd á 85 fermetrar, umframt vaski- og goymslurúm á 15 fermetrar - í alt 97. Byggiár: 1978. Í íbúðini eru inngongd, gongd, baðirúm, hjúnarrúm, kamar, køkur og stova við útgongd til altan og hjall. Íbúðin er væl hildin og í góðum standi og í væl hildnum íbúðarbygningi, ið stendur væl fyri nær býnum nær við skúla, 2 barnagarðar, 2 handlar og gott busssamband. Har er friðarligt og barnavinaligt umhvørvi við spæliplássi og sera gott útsýni. Íbúðin verður seld, um hóskandi boð fæst.



**Sethús – Velbastaðvegur 23, Tórshavn**
Húsini eru í 2 hæddum hvør á 67 fermetrar - í alt 134 fermetrar. Grundøkið er 875 fermetrar. Byggiár: 1968. Húsini eru uppdaterað so við og við, og vindeygu og tak (tætt tróður) er skift um 1990 og úthurð í 2004. Í erva er inngongd, gongd, køkur, stova, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Í neðra er inngongd, gongd, kamar, fýrrúm / vaskirúm / kjallararúm við egnari inngongd. Góður møguleiki og klárt er at innrætta restina av niðastu hædd. Húsini standa á stórum grundøki nær við Sandá. Har er friðarligt, náttúruvakurt, gott útsýni, og stutt er til barnagarð og busssamband. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



**Sethús – millum Gilja 141, Hoyvík**
Húsini eru í 2 hæddum á 102 fermetrar - í alt 204 fermetrar. Hartil er hjallur á 10 fermetrar. Grundøkið er 500 fermetrar. Byggiár: 1988. Niðasta hædd er innrættað og nakað av umvælingum er gjørt í 2002. Í erva er inngongd, durur, hjallur, gongd, gestawc, matarkøkur, borðstova / stova við útgongd til altan, hjúnarrúm, baðirúm, og 2 kømur. Í neðra er inngongd, durur, trappugongd, 2 kømur, vaski- / fýrrúm og garaga. Framman fyri húsini er garður / urtagarður. Húsini standa í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi. Har er UEFA-vøllur / spælipláss, og stutt er til barnagarð og skúla.



**Sethús – Oyrabakkavegur 40, Oyrarbakki**
Húsini eru í 3 hæddum - har niðasta hæddin og miðhæddin er um 35 fermetrar og ovasta hæddin um 30 fermetrar - samlað búvídd um 100 fermetrar umframt ein garaga á 35 fermetrar, sum ikki er liðug. Grundøkið er 1377 fermetrar. Byggiár: um 1907. Húsini eru høvuðsumvæld 2005-07, gólvini, innveggir, køkur, hvíttvørur, rør, rottangi, el, hurðar og vindeygu eru skift. Veggirnir innan eru úr furu og gólvini í stovuni og køkinum eru úr merbau. Køkurin er massivt ljóst træ við Miele-hvíttvørum og induktións-kókiplátum. Í miðhæddini er gongd, baðirúm, køkur / stova. Í ovastu hædd er hjúnarrúm, kamar og útiloft. Í niðastu hædd er vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm. Húsini standa í nátúrvøkrum og fríðum umhvørvi og hava gott útsýni bæði norður og suður gjøgnum Sundalagið. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



**Sethús – Blankagøta 10, Tórshavn**
Húsini eru í 3 hæddum. 2 hæddir eru 80 fermetrar hvør og ovasta hædd er 50 fermetrar - í alt 210 fermetrar búøki. Í niðastu hædd er sjálvstøðug íbúð. Grundøkið er 505 fermetrar. Byggiár: 1988. Húsini eru væl hildin og í góðum standi. Klárt er at gera bilhús. Í miðhæddini er inngongd, opin durur, hjallur, bryggers, gongd, gestawc, matarkøkur og borðstova / stova. Í ovastu hædd er trappugongd, stórt hjúnarrúm við svala, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, trappugongd, stova / køkur, baðirúm, kamar og vaskirúm / fýrrúm. Húsini standa hampiliga frítt fyri í friðarligum, barnavinaligum og náttúruvøkrum umhvørvi við góðum sólargangi. Stutt er til dagstovn, FIFA-vøll og busssamband.

**Íbúarbygningur – Hoydalsvegur 36 / Tinghúsvegur 89, Tórshavn**
Bygningurin er í 3 hæddum á 138 fermetrar - í alt 414 fermetrar. Grundøkið er 560 fermetrar. Byggiár: 1959. Í niðastu hædd eru 2 íbúðir: 1 íbúð á 40 m2 og 1 á 20 m2. Í miðhæddini eru 3 íbúðir: 1 á 44 m2, 1 á 22 m2 og 1 á 20 m2. Hartil er vaskirúm / fýrrúm, baðirúm og goymslurúm í alt 36 m2. Í ovastu hædd er 1 íbúð á 124 m2. Har er inngongd, hjallur, dudur, arbeiðsrúm, gongd, køkur / alrúm / borðstova, stór stova við utgongd til altan, hjúnarrúm, 2 baðirúm, og 2 kømur. Hartil er úthús. Garður / urtagarður er uttan um húsini. Húsini standa sera væl fyri í náttúruvøkrum, friðarligum og veðurgóðum umhvørvi nær miðbýnum. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



**Virkisbygningur – Stoksoyrarvegur 10, Klaksvík**
Bygningurin er í 3 hæddum. Niðasta hædd og miðhæddin er um 1000 fermetrar hvør (uttara mát), og ovasta hædd er um 400 fermetrar - í alt um 2400 fermetrar. Grundøkið er 3079 fermetrar. Annar parturin er bygdur í 1930'unum og hin í 1950'unum. Bygningurin var fram til 1997 brúktur til fiskavirking, og síðani er hann brúktur til goymslu. Byggisamtyktin er nú broytt, so tú kanst brúka bygningin og økið til m.a. trivnaðar-, mentannar-, handils- og matstovuvirksemi og til umsiting. Møguleiki er fyri at gera innkoyring frá Stoksoyrarvegnum. Ognin verður seldur um hóskandi boð fæst.



**Sethús – Lágarvegur 32, Strendur**
Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml 210 fermetrar, umframt ein hjallur á 12 fermetrar. Grundøkið er 1166 fermetrar. Byggiár: 1959. Ymiskar umvælingar eru gjørdar tey seinastu 5-6 árini M.a. er takið, klædningurin, ketilin og fleiri vindeygu skift. Í miðhæddini er gongd, køkur og 2 stovur. Í ovastu hædd er gongd, baðirúm, hjúnarrúm og 4 kømur. Í niðastu hædd er kjallararúm / fýrrúm / vaskirúm nog brúsurúm. Húsini standa við blindan veg uttarliga í bygdin og hava sera gott útsýni yvir fjørðin. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

Sosialurin 341800

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01
inni